Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS

# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 26. MAI 2016

# ÁRSFRÁGREIÐING 2015

## Frágreiðing frá nevndini

*Framleiðsla og søla*

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í fjør uml. 66.000 tons í kruvdari vekt. Framleiðslan var sostatt nakað lægri enn í 2014, tá havbúnaðurin framleiddi góð 70.000 tons. Minkingin í framleiðsluni var uml. 7%, og er serliga orsakað av tíðarbundu sveiggjunum í framleiðsluni. Søluvirðið minkaði eisini úr góðum 2,9 mia. kr. í 2014 niður í uml. 2,8 mia. kr. í 2015. Framvegis stendur føroyska alivinnan tó fyri knappa helvt av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann størsta einstaka útflutningsvøran úr Føroyum. Føroyska alivinnan marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin sum føroyskur laksur fær á marknaðinum er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Seinastu árini er alsamt størri parturin av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, eitt nú Russland, USA og Kina. Í 2006 fór knapt 80% av útflutningsvirðinum av aldum laksi til ES, men hesin partur er minkaður so líðandi, og í 2015 fór minni enn 30% av útflutningsvirðinum til ES-lond. Eftir 10 árum er marknaðarparturin til ES sostatt minkaður við meira enn einari helvt, og tað er eisini serliga uttanfyri Evropa, at vøksturin í søluni er eyðsýndur í hesum tíðum.

Karmarnir kring alivinnuna eru sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori, sjúkustøðu og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði, men hevur tó verið hækkandi seinastu árini. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein høgur laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt góð fíggjarlig úrslit í 2015. Góðu fíggjarligu úrslitini hava eisini haft við sær, at alivinnan hevur møguleika at gera íløgur í framleiðslutólini. M.a. verða íløgur gjørdar í útbygging av smoltstøðunum, nýggjum brunnbátum og onnur tól. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt.

*Lívfrøðiligir váðar*

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin framvegis at verða tikin í størsta álvara.  Fyri at minka um tørvin á medisinskari viðgerð, eru feløgini farin undir

at nýta m.a. rognkelsi, feskvatnsviðgerð, lúsaspularar og termolúsarar til at halda lúsatalinum niðri.

Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar, og síðan tá eru fleiri royndir við rognkelsum gjørdar. Tað er ov tíðliga at siga við vissu, hvørja ávirkan rognkelsini fara at hava á lúsatalið, men royndirnar higartil hava verið góðar, og eingin ivi tykist vera um, at rognkelsini kunnu vera við til at halda lúsatalinum niðri.
Í 2015 varð nýggi brunnbáturin Hans á Bakka tikin í nýtslu. Hesin brunnbátur gevur møguleika fyri at viðgera móti laksalús við at nýta feskvatn. Lúsaspularar og termolúsarar er onnur tøkni sum verður nýtt fyri at minka um tørvin á medisinskari viðgerð.

*Marknaðarútlit*

Globala framleiðslan av laksi øktist við uml. 3% í 2015, men hóast hetta helt prísurin sær á einum høgum støði. Globala framleiðslan av laksi minkar í ár væntandi uml. 6% í mun til í fjør, ikki minst orsakað av trupulleikunum í Chile. Marknaðarútlitini eru tískil góð uppá stutt sikt, og prísurin á laksi hevur higartil í 2016 verið óvanliga høgur, og væntast eisini at vera góður tað sum eftir er av árinum. Tað er tó meira ivasamt, hvørja ávirkan høgi laksarprísurin kann fáa á marknaðin uppá longri sikt. Hóast prísurin í løtuni er góður, er tó umráðandi at minnast til, at laksaprísurin søguliga sæð hevur sveiggjað nógv, og tí kunnu aftur koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum.

Í 2015 vórðu umleið 15,9 mió. smolt sett út í Føroyum. Hetta er nakað meira enn í 2014, tá umleið 14,7 mió. smolt vórðu sett út. Í 2016 veksur samlaða framleiðslan av laksi frá føroyskum havbúnaði væntandi nakað aftur, m.a. orsakað av náttúrligu sveiggjunum í framleiðsluni.

*Skattur og avgjøld*

Á heysti 2015 var enn ein nýggj skipan fyri loyvisskatt fyri alifyritøkur sett í verk, sum legði eitt tøkugjald á alivinnuna, sum er 4,5% av einum roknaðum søluvirði. Talan er um eina munandi hækking í mun til tað avgjald, sum var galdandi áðrenn. Frammanundan skuldu alifyritøkur gjalda ein eykaskatt á 4,5% av yvirskotinum

umframt 0,5% av roknaða søluvirðinum. Hetta er nú broytt, so tað einans er søluvirðið, sum verður skattað, líka mikið um nakar vinningur er ella ikki.

Við nýggju skipanini er reellur vandi fyri, at alifyritøkur noyðast at gjalda skatt, hóast virksemið skuldi givið undirskot. Í dag er forðingin fyri vøkstur í heimsframleiðsluni serliga trupulleikarnir við laksalús, og er tað tí serliga laksalúsin sum heldur prísinum uppi. Tá trupulleikin við laksalúsini verður loystur, og heimsframleiðslan fer at vaksa aftur, mugu vit vænta at vinningurin fer niður aftur á tað støðið, sum hann var áðrenn trupulleikarnir við laksalúsini tóku seg upp. Tá verður trupult yvirhøvur at hava nakað yvirskot at reinvestera í fyritøkuna, um verandi avgjaldsskipan verður varðveitt.

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum heldur, at skattur eigur at vera rindaður av yvirskotinum, og ikki av umsetninginum, tí so vita fyritøkurnar, at tær skulu rinda skatt tá tær forvinna pengar, og ikki tá undirskot er.

Eitt avkast í alivinnuni er ein fortreyt fyri, at føroysk alivinna kann vaksa og gera tær íløgur, sum eru við til at skapa enn meira virksemi og arbeiðspláss. Tað er umráðandi, at støðugir og góðir karmar kveikja áhugan at fremja íløgur her á landi. Seinastu árini er avgjaldsskipanin broytt á hvørjum ári, og ofta við sera stuttum skotbrá. Hetta stimbrar ikki íløguhugin í alivinnuni.

# Innihaldsyvirlit

1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ........ 6

2. ALMENT UM GONGDINA Í ALIVINNUNI ........ 7

2.1 FRAMLEIÐSLA ........ 8

2.2 ÚTSETING AV SMOLTI ........ 10

2.3 ÚTFLUTNINGUR ........ 11

2.4 PRÍSIR ........ 11

2.5 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI ........ 14

2.6 BÝTIÐ SEINASTU ÁRINI ........ 15

3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ........ 16

3.1 LOYVISGJALD ........ 16

3.2 APOTEKIÐ ........ 17

3.3 ROGNKELSI ........ 17

3.4 ALIRÁÐSTEVNAN ........ 18

3.5. ROGNAFRAMLEIÐSLA ........ 18

3.6 ISFA OG FEAP ........ 19

3.7. SALMON FROM THE FAROES ........ 19

4. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ........ 20

4.1 LØGTINGSLÓG UM LOYVISGJALD Á ALIVINNU ........ 20

4.2. KUNNGERÐ UM ÁSETING AV SØLUPRÍSI Á HEILIVÁGI ........ 20

4.3 KUNNGERÐIR Í S.V. BROYTINGAR Í VÁPNALÓGINI ........ 20

4.4 BROYTINGAR Í LÚSAKUNNGERÐINI ........ 21

## 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá føroyskum havbúnaði - bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:
Atli Gregersen, Luna
Egill Steintórsson, Faroe Farming
Hans Jákup Mikkelsen, Marine Harvest
Regin Jacobsen, Bakkafrost

Varalimur:
Odd Eliasen, Havsbrún

## 2. Alment um gongdina í alivinnuni

Gongdin í havbúnaðinum í Føroyum er framvegis góð, og fíggjarligu úrslitini seinastu árini hava verið góð. Karmarnir kring havbúnaðin eru sum heild góðir, hóast vinna og myndugleikar áhaldandi mugu hava eyguni opin fyri møguligum broytingum, ið kunnu gerast til tað betra. Tað er av alstórum týdningi, at havbúnaðurin framhaldandi leggur dent á skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Føroyskur havbúnaður hevur seinastu árini kunnað víst á nøkur av heimsins bestu úrslitum viðvíkjandi vøkstri, fóðurfaktori, framleiðslukostnaði og prísi. Fellið hevur eisini verið sera lágt, hóast tað hevur verið hækkandi seinastu árini. Samanborið við aðrar havbúnaðartjóðir hevur føroyskur havbúnaður sera góð úrslit at vísa á, og tað er eisini grundarlagið undir teimum góðu úrslitunum seinastu árini. Tryggir og støðugir lívfrøðiligir karmar umframt nærlagni og dugnasemi í framleiðsluni hava haft við sær, at føroyski havbúnaðurin í dag bæði er lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggur.

Síðan kreppuna í føroyskum havbúnaði fyri góðum 10 árum síðani, er framleiðslan av alifiski økt støðugt. Framleiðslan í 2015 var uml. 66.000 tons í kruvdari vekt, ein minking í mun til tey gott 70.000 tonsini, sum vórðu framleidd í 2014. Í 2016 væntast samlaða framleiðslan at vaksa nakað aftur, so hon aftur verður 70.000 tons í kruvdari vekt. Samlaða framleiðslan er tó tengd at, hvussu væl fiskurin veksur, og tí er torført at siga við vissu, hvussu stór samlaða framleiðslan verður í ár.

Útflutningsvirðið í 2015 var uml 2,8 mia. kr. samanborið við góðar 2,9 mia. kr. í 2014. Samanumtikið hevur 2015 verið eitt gott ár við støðugari framleiðslu og høgum miðalprísi.

Í 2016 verður mett, at útboðið av aldum laksi á heimsmarknaðinum minkar við umleið 6 prosentum, í mun til ein vøkstur á 3 prosent í 2015. Laksaframleiðslan verður tá væntandi á leið 2,0-2,1 mió. tons í 2016. Orsøkin er serliga, at trupulleikar eru við laksaalingini í Chile. Um eftirspurningurin heldur sær, eru tí útlit til, at prísurin fer at halda sær á einum høgum støði, eins og vit hava sæð higartil í ár.

Miðalprísurin á feskum føroyskum laksi var í 2012 góðar 28 kr/kg, men hevur seinastu trý árini verið omanfyri 40 kr/kg. Í 2015 fór miðalprísurin upp um 43 kr/kg. Orsøkin til prísgongdina er helst, at eftispurningurin eftir laksi er øktur, samstundis sum tað hevur verið torført at økja um heimsframleiðsluna orsakað av laksalús.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir framhaldandi arbeiða við at betra hesar karmar.

## 2.1 Framleiðsla

Tøkan í 2015 var 80.629 tons í livandi vekt, og er hetta uml. 7% minni enn í 2014, sum var metár. Minkingin í 2015 er orsakað av teimum vanligu sveiggjunum í framleiðslugongdini. Væntandi fer tøkan at vaksa eitt sindur aftur í 2016. Í mynd 1 sæst annars, at framleiðslan í alivinnuni síðani kreppuárini í 2004-2006 sum heild hevur verið vaksandi. Í 2009 var tøkan komin uppaftur á sama støði sum í 2003, og er seinastu fýra árini vaksin uppaftur meira, og hevur ligið millum 76 og 86 tús. tons.

Eingi síl vórðu tikin í 2015, og yvirhøvur hevur tøkan av sílum verið millum lítil og eingin seinastu árini. Nøkur fá síl vóru tikin í 2013, men talan var tá um sera smáar nøgdir.

**Mynd 1. Tøka av alifiski**




| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 3,126 | 11,149 | 10,220 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 46,014 | 44,953 | 52,526 | 40,985 | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 | 80,629 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Mynd 2 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku í 2015. Her sæst, hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Tað hevur verið vanligt, at størstu nøgdirnar vórðu tiknar um heystið, men í 2015 og eisini árið fyri hava størri nøgdirnar verið tiknar í fyrru helvt av árinum.

**Mynd 2. Tøka av alifiski viku fyri viku í 2015**




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útseting av laksi og sílum seinastu 20 árini. Myndin vísir, at útsetingin av smolti við ávísum undantøkum er økt støðugt frá 2004 til 2015, men síðani hevur vøksturin verið nakað minni. Útsetingin í 2015 var umleið 15,9 mió. smolt, og tað er ein vøkstur uppá 1,2 mió smolt í mun til 2014. Vert er at leggja til merkis, at útsetingin framvegis er væl lægri, enn hon var árini eftir aldarskiftið, men at munandi meira fæst burturúr tí, sum nú verður sett út.

Talið av sílum, sum eru sett út, er støðugt minkað. Í 2007 vóru omanfyri tvær mió. síl sett út, men síðan er talið støðugt minkað, og síðan 2010 eru eingi síl sett út.

**Mynd 3. Útseting av smolti frá 1996 til 2015**




Kelda: Rúni Dam, Sp/f Avrik

## 2.3 Útflutningur

Mynd 4 vísir, at útflutningsvirðið á alifiski fyri fyrstu ferð í 10 ár var minni enn undanfarna ár. Annars er útflutningsvirðið fram til og við 2014 økt á hvørjum ári síðani 2005. Útflutningsvirðið av alifiski var í 2015 uml. 2,8 mia. kr. Í roynd og veru er bara talan um útflutning av laksi, tí útflutningurin av sílum er minkaður niður í einki. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøra hjá Føroyum og stendur nú fyri knapt helvtina av fiskavøruútflutninginum hjá Føroyum.

**Mynd 4. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2003 til 2015 (1000 kr.)**




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SÍL | 159.912 | 77.366 | 58.674 | 98.859 | 100.773 | 138.618 | 175.082 | 69.954 | 8.724 | 195 | 2.585 | 273 | 152 |
| LAKSUR | 804.623 | 684.992 | 439.852 | 374.320 | 492.661 | 824.419 | 1.203.595 | 1.338.081 | 1.618.393 | 1.822.514 | 2.456.409 | 2.950.538 | 2.799.127 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin á feskum laksi hevur aftur hildið sær á einum høgum støði í 2015. Miðalprísurin fyri árið var uml. 43 kr. pr. kilo, og hetta er ein vøkstur í mun til 2014, tá kiloprísurin var góðar 41 krónur. Marknaðarprísurin hevur sjálvsagt stóra ávirkan á úrslitið hjá alifeløgunum, og søguliga hevur prísurin sveiggjað nógv.

Mynd 5 vísir ein ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1996 til 2015. Sum myndin vísir, eru nakrir prístindar og nakrar prísgjáir.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru sjálvandi nógv tengd at gongdini í samlaðu framleiðsluni í heiminum. Samlaða heimsframleiðslan er serliga tengd at, hvussu tað eydnast at minka um trupulleikan við laksalúsini, sum hevur verið ein avbjóðing um allan heim. Metingar siga, at heimsframleiðslan av laksi fer at minka við uml. 6% í ár, samstundis sum eftirspurningurin er høgur, og tilsamans hevur hetta haft við sær, at prísurin higartil í ár hevur verið óvanliga høgur. Útlit eru fyri, at laksaprísurin heldur sær á

einum høgum støði, tað sum eftir er av 2016, hóast hann sambært forsagnunum á Fish Pool kanska ikki verður heilt so høgur sum fyrstu mánaðirnar í 2016.

**Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi (ársins prísir). FOB Føroyar**




| | ´96 | ´97 | ´98 | ´99 | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | ´11 | ´12 | ´13 | ´14 | ´15 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 23 | 23 | 21 | 24 | 28 | 20 | 19 | 16 | 18 | 22 | 30 | 25 | 24 | 28 | 37 | 31 | 28 | 41 | 41 | 43 |

Kelda: Hagstova Føroya

Framleiðslan av laksaportiónum tók veruliga dik á seg í 2003, og mynd 6 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum seinastu tíggju árini. Í fjør fekst hægsti miðalprísur nakrantíð fyri laksaportiónirnar, tá miðalprísurin var omanfyri 80 kr/kg. Av tí, at prísurin á laksaportiónum í stóran mun verður ásettur í langtíðarsáttmálum, er prísurin ofta meira støðugur enn á øðrum laksavørum.

**Mynd 6. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaflaki (laksaportiónum) 2006-2015.**




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Laksaportiónir | 68,45 | 57,69 | 50,85 | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,62 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2006 til 2015. Nógv tann størsti parturin er framvegis heilur feskur laksur, sum í fjør hevði eitt útflutningsvirði uppá knappar 2 mia. kr. Síðan 2006 er útflutningurin av laksaportiónum sum heild øktur, men í 2015 minkaði útflutningurin av frystum flaki við uml. 160 mió kr. í mun til árið fyri. Úr uml. 850 mió kr. í 2014 niður í uml. 690 mió kr. í 2015. Nakað verður eisini útflutt av heilum frystum laksi.

**Mynd 7. Býtið av útflutningi 2006-2015**




Kelda: Hagstova Føroya

Í mynd 8 sæst prosentvísa býtið av útflutningsvirðinum millum ymisku laksavørurnar. Her sæst m.a. at útflutningurin av heilum laksi nú í fleiri ár hevur verið uml. 70% av samlaða útflutninginum. Talan er serliga um heilan, køldan laks. Laksaportiónirnar hava eisini ligið nokk so stabilt við einum parti á uml. 25 % seinastu árini.



## 2.6 Býtið seinastu árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit yvir útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Tølini eru fyri seinastu tíggju árini.

Talva 1. Útflutningsvirðið fyri ymsu vørubólkarnar frá 2006 til 2015, í tús. kr.

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 134.650 | 254.581 | 547.364 | 795.934 | 803.161 | 1.113.741 | 1.282.705 | 1.720.921 | 1.970.142 | 1.949.770 |
| Frystur laksur | 32.572 | 55.274 | 40.826 | 68.587 | 69.508 | 26.508 | 40.018 | 45.235 | 23.257 | 34.902 |
| Laksaportiónir | 195.024 | 171.806 | 213.274 | 303.505 | 423.931 | 428.702 | 447.138 | 618.848 | 852.652 | 693.524 |
| Laksur, annað | 10.461 | 11.000 | 19.927 | 34.703 | 41.482 | 48.332 | 51.599 | 71.406 | 103.545 | 120.930 |
| Fesk síl | 34.657 | 14.043 | 13.814 | 48.320 | 43.865 | 1.356 | 0 | 418 | 0 | 0 |
| Fryst síl | 64.034 | 86.730 | 124.731 | 123.149 | 24.851 | 7.368 | 0 | 1.981 | 273 | 1 |
| Síl, annað | 168 | 0 | 73 | 3.613 | 1.238 | 0 | 195 | 186 | 0 | 151 |
| **Tilsamans** | **471.566** | **593.434** | **960.009** | **1.377.809** | **1.408.035** | **1.626.007** | **1.821.654** | **2.458.994** | **2.949.869** | **2.799.279** |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2006 til 2015, tons

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 4.514 | 10.347 | 22.681 | 28.489 | 21.541 | 35.549 | 45.067 | 42.312 | 47.565 | 45.329 |
| Frystur laksur | 1.073 | 2.087 | 1.598 | 2.587 | 1.778 | 747 | 1.483 | 1.204 | 611 | 983 |
| Laksaportiónir | 2.849 | 2.978 | 4.194 | 5.653 | 6.339 | 5.982 | 7.633 | 9.473 | 10.775 | 8.601 |
| Laksur, annað | 1.131 | 1.400 | 3.280 | 3.835 | 4.037 | 3.977 | 4.881 | 5.922 | 7.918 | 7.189 |
| Fesk síl | 1.302 | 637 | 644 | 2.059 | 1.273 | 18 | 0 | 19 | 0 | 0 |
| Fryst síl | 2.302 | 3.864 | 5.598 | 4.970 | 779 | 219 | 0 | 69 | 15 | 0 |
| Síl, annað | 6 | 0 | 6 | 143 | 142 | 0 | 26 | 3 | 0 | 4 |
| **Tilsamans** | **13.177** | **21.313** | **38.002** | **47.734** | **35.888** | **46.492** | **59.089** | **59.002** | **66.884** | **62.106** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2006 til 2015, kr. pr. kg.

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 29,83 | 24,60 | 24,13 | 27,94 | 37,29 | 31,33 | 28,46 | 40,67 | 41,42 | 43,01 |
| Frystur laksur | 30,36 | 26,49 | 25,55 | 26,52 | 39,09 | 35,49 | 26,99 | 37,56 | 38,07 | 35,50 |
| Laksaportiónir | 68,45 | 57,69 | 50,82 | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,62 |
| Laksur, annað | 10,67 | 7,86 | 7,00 | 9,05 | 10,28 | 12,15 | 10,57 | 12,06 | 13,08 | 16,82 |
| Fesk síl | 26,62 | 22,06 | 21,45 | 23,47 | 34,45 | 74,53 | - | 22,47 | - | - |
| Fryst síl | 27,81 | 22,45 | 22,28 | 24,78 | 31,90 | 33,58 | - | 28,92 | 18,07 | - |
| Síl, annað | 29,49 | - | 11,77 | 25,28 | 8,75 | - | 7,52 | 54,62 | - | 39,66 |

## 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

Her er ein stutt frágreiðing um nøkur mál, ið nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

### 3.1 Loyvisgjald

Aftaná valið í heyst, boðaði nýggja samgongan frá, at ætlanin var at føroyskur havbúnaður skuldi gjalda omanfyri 100 mió kr. í loyvisskatti. Nýggju ætlanirnar komu óvart á, tí felagið hevði stutt frammaundan luttikið í arbeiðinum í einum arbeiðsbólki, sum viðgjørdi loyvisskattin hjá havbúnaðinum, og har komið varð fram til eina skipan, har alifyritøkur gjalda 0,5% í umsetningsgjaldi og 4,5% eykaskatt av yvirskotinum.

Felagið vísti á, at skattainntøkurnar frá havbúnaðinum vóru øktar munandi seinnu árini, og at tað var skeivt bara at fokusera á loyvisskattin. Felagið vísti millum annað á, at alifyritøkurnar í 2014 tilsamans høvdu 426 milliónir í partafelagsskatti, kapitalvinningsskatti, og loyvisskatti. Í hesum er ikki íroknað skattainntøkurnar frá persónligum inntøkuskatti frá starvsfólki í alivinnuni ella avleiddum virksemi annars. Ein partur av teimum 426 mió kr. er útsettur skattur, sum verður goldin seinni, men framvegis rindaði havbúnaðurin omanfyri 300 mió kr. í skatti fyri roknskaparárið 2014, um útsetti skatturin ikki verður íroknaður.

Felagið varð seinni kunnað um, at ætlanin hjá landsstýrinum var, at havbúnaðurin frá 1. januar at rokna skuldi gjalda 5% av roknaða umsetninginum í einum tøkugjaldi. Skotbráið at viðgera lógaruppskotið var sera stutt, men felagið skrivaði hoyringssvar, sum varð lagt við lógaruppskotinum. Í hoyringssvarinum viðmerkti felagið bæði støddina á loyvisskattinum og háttin hann varð skipaður sum eitt umsetningsavgjald. M.a. varð víst á at:

- Alivinnan er ein vinna í altjóða kapping, og tá er at neyðugt at taka atlit til, hvørjar karmar okkara kappingarneytar hava. Felagið vísti á at í grannalondunum verða skattir og avgjøld hjá havbúnaðinum sum heild lækkaðir, t.d. minkar norski partafelagsskatturin í stórum.
- Eitt tøkugjald á 5% av umsetninginum kann við einum yvirskotsgradi á 25% sammetast við eyka partafelagsskatt á uml. 20%. Hesin kemur so afturat verandi partafelagsskatti, sum er 18%. Tað man vera eindømi í øllum heiminum, at ein vinnugrein verður skattað so hart, at meira enn ein triðingur av teimum pengunum, sum m.a. skulu nýtast til at gera íløgur í vinnuna, verða tiknir úr feløgunum, áðrenn nakað vinningsbýti er goldið.
- Eitt so høgt gjald fer at fáa avleiðingar fyri íløgur og rakstur í føroysku alivinnuni í komandi árum.Tað verða færri íløgur framdar, og færri nýggj starv verða skapt.
- Føroyskur havbúnaður hevur eins og havbúnaður aðrastaðni avbjóðingar við laksalús, og tørvur er á stórum íløgum nú og í komandi árum, eins og roknast má við øktum útreiðslum annars, fyri at handfara hesa avbjóðingina.

- Víst varð eisini á, at Havbúnaðarfelagið í fleiri umførum hevur ført fram, at skatturin á vinnuna eigur at verða grundaður á yvirskot. Seinast varð hetta ført fram í fyrireikandi arbeiðinum, sum var grundarlag undir, at loyvisskatturin varð settur í verk í 2014. Hetta er framvegis støða felagsins.

Løgtingið samtykti uppskotið hjá landsstýrinum, tó at umsetningsgjaldið varð minkað við hálvum prosentstigi niður á 4,5% av roknaða umsetninginum.

## 3.2 Apotekið

Havbúnaðarfelagið hevur í mong ár ynskt, at einkarrætturin hjá Apotekinum at selja heilivág til havbúnaðin verður avtikin, men enn hevur politiski myndugleikin tíverri ikki broytt verandi monopolskipan. Felagið hevur haft fund við landsstýriskvinnuna í Heilsu- og innlendismálum um málið, sum skilst ætlar landsstýriskvinnan ikki í løtuni at avtaka einkarrættin hjá apotekinum.

Eitt dømi um, hvussu óheppin verandi skipan er, kom fram herfyri, tá Heilsu- og Innlendismálaráðið við kunngerð hækkaði vinningsprosentið hjá Apotekinum úr 13% upp í 15%, m.a. tí havbúnaðurin hevði keypt minni av heilivági frá apotekinum. Felagið fekk sera stutt skotbrá at viðmerkja kunngerðina, men vísti á, at heldur enn at pjøssa uppá eina ósunna skipan, átti Heilsu- og Innlendismálaráðið at avtikið einkarrættin við heilivági til alivinnuna. Eisini nýtti felagið høvið at vísa á, at tá almenn gjøld verða ásett í kunngerð, skal samsvar vera millum tað, sum tað kostar at veita tænastuna og tað sum verður kravt inn. Annars er talan um ein eykaskatt, sum bara kann ásetast við lóg.

## 3.3 Rognkelsi

Reinsifiskar hava í fleiri ár verið nýttir í royndunum at basa lús í Noregi, og royndirnar hava higartil verið so mikið góðar, at tað stendur á at framleiða tey rognkelsi, sum eru neyðug fyri at nøkta tørvin hjá norska havbúnaðinum. Við góðu royndunum í huga hevur Havbúnaðarfelagið seinastu fýra árini saman við Fiskaaling fíggjað eina royndarverkætlan um at framleiða rognkelsi í Føroyum. Verkætlanin endaði í mars 2016, tá seinasta úrslitið frá verkætlanini var klárt: ein manualur fyri framleiðslu av rognkelsum (best practice). Harumframt fevndi verkætlanin um ymisk granskingarverkevni, sum eru lýst í manualinum.

Eitt annað úrslit av verkætlanini var ein royndarframleiðsla uppá uml. 200 tús. rognkelsi, sum vórðu sett út í ringar hjá alifeløgunum. Ætlanin var at royndarframleiða 400 tús

rognkelsi, men trupulleikar í framleiðsluni, serliga í byrjanini, hava viðført, at veruliga talið gjørdist knappliga helvtina av hesum, og at verkætlanin varð nógv seinkað.

Seinkingarnar í royndarframleiðsluni hava skundað undir, at feløg byrjaðu at innflyta rognkelsi úr Íslandi, sum eru sett út í aliringar. Tær royndirnar hava eydnast væl, tó at avbjóðingar hava verið við m.a. flutninginum úr Íslandi.

Í sambandi við, at verkætlanin endaði, skipaði Havbúnaðarfelagið saman við Fiskaaling fyri einum felags fundi fyri alarar úr øllum alifeløgum um praktisk viðuskifti í sambandi við útseting og røkt av rognkelsum. Ætlanin er, at alifeløgini við jøvnum millumbilum skipa fyri fundi, har alarar kunna tosa sínamillum um rognkelsi.

Støða er enn ikki tikin til, um farast skal undir veruliga rognkelsisframleiðslu í Føroyum, og um so er, hvussu hetta skal skipast.

## 3.4 Aliráðstevnan

Havbúnaðarfelagið hevur seinastu tíggju árini skipað fyri eini árligari aliráðstevnu, sum tey seinastu árini hevur verið á Hotel Føroyum. Ráðstevnan er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við Aliráðstevnuni er at førleikamenna starvsfólkið innan alivinnuna, og at geva starvsfólkum í vinnuni møguleika at hittast og netverka.

Miðað verður eftir at hava eina fjølbroytta skrá, so at starvsfólkini innan alivinnuna kunnu fáa okkurt burturúr teimum fyrilestrum, ið verða hildnir. Aliráðstevnan var aftur í ár sera væl vitjað við næstan hálvt fjórðhundrað gestum.

Framløgurnar frá Aliráðstevnuni 2016 eru eins og framløgur frá undanfarnum árum at finna á heimasíðuni hjá vinnuhúsinum www.industry.fo

## 3.5. Rognaframleiðsla

Havbúnaðarfelagið tók í farna ári stig til at gera eina undankanning, sum kundi lýsa fortreytirnar fyri eina felags føroyska rognaframleiðslu. Í frágreiðingini vóru fortreytirnar fyri slíkari framleiðslu lýstar, og ein business case varð gjørd. Hørdur Wardum og Símun Joensen skrivaðu frágreiðingina fyri Havbúnaðarfelagið.

## 3.6 ISFA og FEAP

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association) og FEAP (The Federation of European Aquaculture Producers). Felagið hevur tó meldað seg úr FEAP frá 1. Januar 2017 at rokna. Orsøkin er, at felagið má raðfesta, hvat felagið nýtir sínar ressursur til, og mett var, at onnur mál eru meira átroðkandi. Felagið er framvegis limur í ISFA, og luttók á ársfundinum hjá ISFA, sum varð hildin í sambandi við Aqua-Nor ráðstevnuna í Trondheim.

## 3.7. Salmon from the Faroes

Felagið eigur og rekur heimasíðuna Salmon from the Faroe Islands (www.salmon.fo). Tað koma javnan fyrispurningar um føroyskan havbúnað gjøgnum hesa síðuna, bæði frá keyparum og frá endabrúkarum. Fyrispurningarnir kunnu í stórum býtast í tvey: Fyrispurningar um keyp av føroyskum laksi og fyrispurningar um, hvussu framleiðslan er skipað. Undir hesum síðsta eru eitt nú fyrispurningar um fóður, heilivágsnýtslu, ymisk úrslit frá yvirvøkuskipanum o.s.fr. Í hesum sambandi er tað ein stórur fyrimunur fyri føroyskan havbúnað at kunna vísa á, at einki antibiotika verður nýtt, og at fóðrið verður framleitt uttan GMO.

# 4. Lógir og kunngerðir

Síðan seinasta aðalfund eru hesar lógir og kunngerðir, ið hava týdning fyri alivinnuna, settar í verk ella hava verið til viðgerðar.

## 4.1 Løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu

Løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015 um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu. Lógin, sum varð samtykt í desember fjør og fekk gildi frá 1. Januar 2016, strikaði gjaldið á 4,5% av yvirskotinum, og í staðin varð tøkugjaldið á 0,5% av roknaða marknaðarvirðinum hækkað soleiðis:

1) Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 27 fyri kilo ella hægri, er gjaldið 4,5%.
2) Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 23 fyri kilo ella hægri, men lægri enn kr. 27 fyri kilo, er gjaldið 2,5%.
3) Er miðal altjóða marknaðarprísurin lægri enn kr. 23 fyri kilo, er gjaldið 0,5%.

Talan er sostatt um eina munandi øking í loyvisgjaldinum í mun til tað sum var galdandi áðrenn.

## 4.2. Kunngerð um áseting av søluprísi á heilivági

Kunngerð nr. 40 frá 2. mai 2016 um broyting í kunngerð um áseting av søluprísi á heilivági. Orsakað av minni nýtslu av heilivági í havbúnaðinum umframt bíligari heilivág í sjúkrahúsverkinum, valdi Heilsu- og Innlendismálaráðið at hækka vinningsprosentið hjá apoteksverkinum úr 13% upp í 15%.

## 4.3 Kunngerðir í s.v. broytingar í vápnalógini

Í kjalarvørrinum á broytingum í vápnalógini, har ætlanin er at krevja vápnaprógv fyri at nýta skotvápn, hevur felagið fingið til ummælis 3 kunngerðir:

- Uppskot til kunngerð um lestraræltlan til vápnatrygdarskeið
- Uppskot til kunngerð um skráseting av skotvápnum
- Uppskot til kunngerð um vápnaprógv

Felagið hevði bert smávegis viðmerkingar til kunngerðirnar.

## 4.4 Broytingar í lúsakunngerðini

Felagið hevur í mai 2016 fingið til ummælis uppskot um broytingar í lúsakunngerðini, umframt nakrar leiðreglur í hesum sambandi. Í stuttum snúgva broytingarnar í uppskotinum seg um, at tað verður sett eitt absolutt mark á 1,5 kynsbúna honlús í miðal í einari teljing. Fer lúsatalið upp um hetta, er talan um eitt brot.

Eru ov nógv av slíkum brotum, ella um viðgerðirnar vísa seg ikki at virka, er ætlanin at landsdjóralæknin sum høvuðsreglu fer at krevja útslakt av fiskinum, sum skal fremjast innan 3 mánaðir. Harumframt er í uppskotinum ein klippikortskipan sett í verk, har tal á brotum og tal á medisinskum viðgerðum avgera, um talið á smoltum í einari útseting kann vaksa, skal standa í stað, ella skal minka.